umhvørvisstovan

HERI GUTTESEN
Á TUNGU 2
FO - 386 BØUR

Argir hin 15. juni 2026
Málsnr.: 26/01639
Málsviðgeri: Ása Dam Samuelsen

**Góðkenning av umhvørvisárinsmeting í sambandi við vatntøku í Stórá í Bø til el-framleiðslu**

Umhvørvisstovan góðkennir hervið, sambært § 16, stk. 1 í elveitingarlógini[1], umhvørvisárinsmetingina hjá Hera Guttesen fyri vatntøku í Stórá í Bø til el-framleiðslu. Vatninntak, rørleiðing og vatnorkuverk eru staðsett við Stórá í Bø, staðseting sæst á korti í fylgiskjali 1.

*Verkætlanin*

Vatnorkuverkið er sett upp og tikið í nýtslu, áðrenn umhvørvisárinsmetingin varð góðkend og málið snýr seg tí um góðkenning av verandi verki.

Verkætlanin fevnir um vatninntak í Stórá, rørleiðing og vatnorkuverk. Vatntøkan verður regulerað í stigum við eini sjálvvirkandi skipan. Í umhvørvisárinsmetingini verður lagt upp til, at minsta renslið í ánni, tá myllan koyrir, er 40 litrar um sekundið (l/s), og at vatntøkan verður stýrd í 6 stigum við 13 l/s í hvørjum stigi. Einki vatn verður tikið til mylluna, um renslið í ánni er minni enn 40 l/s. Tað verður tikið millum 13 og 77 l/s til vatnmylluna. Í mesta lagi uml. 77 l/s verða tiknir, tá renslið í ánni er 117 l/s ella størri.

Vatnið verður ført frá inntakinum til verkið við einari uml. 760 m langari rørleiðing. Rørleiðingin liggur í tyrvdari grøv oman gjøgnum líðina vestanfyri ánna. Har sum gil renna tvørtur um leiðingina, verður vatnið tikið upp og veitt aftur í tey náttúrligu gilini niðanfyri turbinurørið. Sambært metingini verður einki vátlendi ávirkað av rørleiðingini.

Verkið hevur eina turbinu við asynkron-generatori og stýritalvu og verður bundið í elnetið hjá SEV. Mett verður, at verkið kann framleiða uml. 400.000 kWt árliga og minka $CO_2$-útlátið við uml. 250 tonsum um árið.

Í metingini er eisini lýst, at ein rist verður sett frammanfyri rørið í inntakinum, ið er ein rustfrí holpláta við holum við tvørmáti á 3 millimetrum (Ø 3 mm), fyri at verja ímóti at síl o.a. fara í rørið.

[1] Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012.

Eftirlit og stýring er lýst við vatnstøðumátara, har upplýsingar um vatnstøðuna støðugt verða loggaðar og goymdar. Eigarin, ið eisini rekur og hevur eftirlit við verkinum, fær sjálvvirkandi boð um frávik og kann fylgja við rakstrinum.

Sambært § 16, stk. 1 í elveitingarlógini skal, áðrenn loyvi kann verða givið til el-framleiðslu, verða gjørd ein umhvørvisárinsmeting, og skal henda verða góðkend av Umhvørvisstovuni.

Endamálið við umhvørvisárinsmetingini er at tryggja, at ávirkanin av verkætlanini á umhvørvið er væl lýst, so at sleppast skal undan óvæntaðum avleiðingum.

*Umsóknin*

Upprunaliga umsóknin um góðkenning av umhvørvisárinsmeting varð móttikin 19. januar 2026. Síðani er hendan eftir áheitan dagførd, so hon fevnir um fleiri upplýsingar. Endaliga umhvørvisárinsmetingin við fylgisskjølum varð móttikin 15. mars 2026.

*Hoyring*

Umhvørvisárinsmetingin varð løgd til almenna hoyring 16. mars 2026 - 27. apríl 2026. Umhvørvisstovan fekk ongar viðmerkingar.
Uppskot til góðkenning av árinsmeting var send umsøkjara og Sørvágs kommunu til hoyringar tann 28. apríl 2026. Ongir viðmerkingar vóru sendir Umhvørvisstovuni.

*Treytir*

Góðkenningin er treytað av, at treytin niðanfyri verður fylgd og at ætlanin annars verður framd sum lýst í móttikna tilfarinum.

1. Tøkan av vatni úr Stórá skal steðga tá vatnið, sum rennur fram við inntakinum fer undir 40 l/s.
2. Um virksemið verður niðurlagt, skal alt tilfar og útgerð beinast burtur, og økið skal fáast aftur í uppruna líki. Hetta skal vera gjørt innan 6 mánaðir.

Hendan góðkenningin tekur ikki støðu til, um neyðugt er við øðrum góðkenningum sambært aðrari lóggávu.

*Eftirlit og gjald*

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við at treytir í hesi góðkenning verða hildnar. Rokning fyri málsviðgerð, sambært í kunngerð um gjøld[2] verður send tá málsviðgerðin er liðug.

[2] Kunngerð nr. 102 frá 22. oktober 2012 um gjøld hjá Umhvørvisstovuni fyri umsiting og eftirlit sambært lóggávuni á umhvørvisøkinum.

*Kæruvegleiðing*
Henda avgerð kann kærast til Føroya Kærustovn. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendir hana til kærustovnin við neyðugum skjølum. Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi avgerðin er almannakunngjørd.

Vinarliga

Ása Dam Samuelsen, málsviðgeri

Avrit av avgerðini er sent til Elveitingareftirlitið.

# Fylgisskjal 1.




*Mynd 1. Staðsetingar: vatninntakið, rørleiðingin og verkið.*